FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

5. november 2025
Mál: 25/28448

Tygara skriv: 52-035/2025

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-035/2025 frá Grími Sundstein, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um tunnil til Vestmanna

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður væntandi farið undir at bora tunnil til Vestmanna ?

2. Hevur landsstýrismaðurin saman við landsstýrinum gjørt nakra endaliga raðfesting av, hvørjir tunlar skulu gerast næst ?

3. Fer arbeiðið at fyrireika og prosjektera tunnil til Vestmanna at halda fram komandi árini, hóast ongir pengar eru játtaðir á fíggjarlógini til Vestmannatunnilin fyri 2026 og frameftir ?

Svar til spurning 1 og 2
Tað er umráðandi, at tað er trygt og skjótt at ferðast um alt landið.

Farleiðin til Vestmanna er sum heild góð, men á vetri kann tað vera trupult at koyra fyri hálku og vindi einstakar dagar, serliga á Høgareyni. Umstøðurnar eru tó ikki øðrvísi enn á øðrum fjallavegum kring landið.

Í høvuðsheitum hevur verið arbeitt við tveimum ymiskum tunnilsloysnum. Onnur loysnin er ein tunnil úr Kvívík til Vestmanna, sum er 4,2 kilometrar langur, og hin loysnin er ein tunnil úr Leynum til Vestmanna, sum er 6,2 kilometrar langur.

Ein tunnil millum Kvívík og Vestamanna verður, sambært Landsverki, mettur til at kosta umleið 600 mió. kr. við 40% váðaískoyti, og ein tunnil millum Leynar og Vestmanna verður mettur til at kosta umleið 900 mió. kr., við einum váðaískoyti uppá 40%. Talan er um 2024 prísir.

Peningur, sum higartil hevur verið játtaður til nýggju farleiðina til Vestmanna, hevur verið brúktur til at kanna, hvørjar loysnir kunnu gerast, og jarðfrøðiligar kanningar eru gjørdar av báðum verkætlanum.

Ein Vestmannatunnil er sera kostnaðarmikil, og tað er ein spurningur um játtan og raðfesting, nær hann verður bygdur. Sum tilskilað í fíggjarlógini fyri 2025, hevur ætlanin higartil verið at fara undir Vestmannatunnilin, tá Tjørnuvíkartunnilin er liðugur, men til ber ikki at siga nú, nær tað verður.

Íløgukarmur landsins verður 570 mió. kr. í 2026 (við løgukendum játtanum), og íløgukarmurin verður síðani eini 600 mió. kr. árliga næstu árini. Nógv byggiarbeiði eru í gongd, ella fara í gongd næsta ár, sum hevur við sær stórar fíggjarligar bindingar næstu árini.

Íløguætlanin verður dagførd javnan, og landsstýrið fer í næstum at gera eina íløguætlan, sum vónandi kann fáa breiða politiska undirtøku.

Landsverk arbeiðir við at dagføra samferðsluætlanina. Sum partur av hesum arbeiðir Landsverk í løtuni við at gera kostnað-nyttu greiningar av verkætlanum innan infrakervið. Endamálið er at lýsa samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar, sum standast av verkætlanum. Tað er eitt gott grundarlag fyri at leggja eina íløguætlan fyri landið.

Svar til spurning 3
Jarðfrøðiligu kanningarnar eru gjørdar, og arbeiðið at prosjektera tunnil til Vestmanna verður gjørt, tá játtan verður tøk til endamálið.

Jóhan Christiansen
Landsstýrismaður